Fylgiskjal 1

Til Uttanríkis- og Vinnumálaráðið

100 Tórshavn

Eg vísi til uppskot til løgtingslóg um grundvatn, sum er dagfest 26. januar 2023, og sum er lagt út til ummælis á heimasíðu tykkara við ummælisfreist til tann 22. februar 2023.

Eg vendi mær til tykkara vegna Ólavur Olsen, sum býr og eigur ogn í Kollafirði.

Í sambandi við at hann boraði á grundstykki sínum í Kollafirði, í sambandi við jarðhitahol, hevur vatn runnið úr boriholinum.

Vatnið er somikið heitt, at familjan hevur brúkt vatnið sum ein týðandi part av upphiting av húsinum, umframt at tey fáa orku úr jarðhitaholinum.

Talan er um vatn, sum rennur úr einum holi, sum tey sjálvi hava borað á teirra egna grundøki, og vatnið verður bert nýtt til teirra egna privata brúk.

Spurningurin er, um hendan nýtsla kann fara at verða ávirkað av nevnda lógaruppskoti, um tað verður samtykt?

Eftir § 2 í lógaruppskotinum, kann eigarin á einum grundøki gagnnýta vatn í egnum húsarhaldi, um grundvatn rennur upp av sær sjálvum, men eftir 2, stk. 2, hevur landið og síðani avvarandi kommunur framíhjárætt at brúka hetta vatn.

Hvat er hugsan tykkara um nýtsluna hjá t.d. Ólavi og teimum, sum hevur verið í mong ár, tvs. væl áðrenn lógin møguliga verður samtykt?

Eg kundi hugsað mær, at lógin, um hon verður samtykt, ikki hevur ávirkan á ta nýtslu, sum í dag er, við tað, at talan tá hevði verið um lóggávu við afturvirkandi kraft?

Ólavur kundi hugsað sær at fingið svar uppá hetta, tí tey føla seg nakað ótrygg orsakað av orðingunum í § 2 í lógaruppskotinum.

Við heilsan / kind regards

Niels Winther Poulsen, adv.

nwp@jura.fo

Advokatskrivstovan

Frúutrøð 4

Postboks 6

110 Tórshavn

Mobil: + 298 21 11 46

Tlf. + 298 35 33 35

Fax + 298 35 33 36

jura@jura.fo

www.jura.fo

All services and communications of Advokatskrivstovan Law Firm are subject to Advokatskrivstovan Law Firm’s Terms of business and Privacy Policy available at Viðskiftatreytir/Terms of business and Privatlívspolitikkur/Privacy Policy

This communication is confidential and may contain information that is legally privileged. If received in error, kindly notify us immediately and delete the communication.